



# Tann 13. stríðsmaðurin – Antonio Banderas

**Sjónleikari, leikstjóri, framleiðari og tónleikari - Antonio Banderas hevur nokk at síggja til. Seinastu tíðina hevur hann gjørt um seg á Broadway, á Eugene O´Neill Theatre, har hann hevur fingið góð ummælir fyri hansara leiklut í sangleikinum "Nine". Hetta var hansara fyrsta ferð sum sjónleikari á einum Broadwaypalli. Ætlanin er at Banderas fer frá hesum sangleikinum 5. oktobur og víðari at arbeiða við eftirfylgjaranum av filminum um Zorro "The Mask of Zorro".**

**Fríggjakvøldið kl. 20.45**







Í filminum Tann 13. Stríðsmaðurin hevur Banderas leiklutin sum tann irakiski yrkjarin, Ibn Fadlan Fadlan, sum í 922 fer at hjálpa nøkrum víkingum úr Norðurlondum móti einum ræðuligum gátukendum fígginda.

Sum revsing fyri at hava verið saman við eini konu hjá einum týðandi persóni í høvuðsstaðnum í arabiska ríkinum, Baghdad, verður Fadlan sendur út sum sendimaður til tey norðaru kongadømini og her møtir hann víkingunum. Teir mangla ein fremmandan 13. stríðsmann, hetta skal vera eitt krav fyri góðan byr og góða eydnu. Hesir norðurlendingarnir sum eru ómentaðir og sera ófantaligir, tað mesta av tíðini eru teir ónærisligir og spýta, líkjast als ikki Fadlan. Men so við og við dámar Fadlan teir betri, hann lærir teirra mál, og frá at vera ein yrkjari gerst hann til ein stríðsmann.

Filmurin er grundaður á bókina "Eaters of the Dead" frá 1976 hjá Michael Crichton, ið er serliga kendur í Hollywood. Hesin er kendur fyri sínar væl gjøgnumførdu skaldsøgur, líkamikið um tær snúgva seg um DNA, rúmdarverður ella lógir um kynsligan ágang. Hann hevur skrivað Jurassic Park søguna, Disclosure og Congo.

Søgan í filminum um tann 13. stríðsmannin er tvinnað saman av miðaldar handritinum, Beowulf, sum snýr seg um ein norðurlendskan stríðsmann og so persónin Ibn Fadlan Fadlan, sum í 922 skrivaði "Risala", ein frágreiðing til kongin í Baghdad, um tað hann sá og upplivdi á ferð síni norðureftir.

**José Antonio Dominguez Banderas**

| | |
|---|---|
| Føddur: | 10 oktobur í Malaga, Spania, í 1960 |
| Familja: | Giftur við Melanie Griffith |
| Leikt í filmum: | The Mambo Kings, Philadelphia, Interview with the Vampire, Four Rooms, Deperado, Evita, Assassins, 13 th Warrior, Spy Kids, The Mask of Zorro, Original Sin, Play it to the Bone, Femme Fatale (2003), Frida (2003) og Spy Kids 2 (2003) |
| Leikstjórnað: | Crazy in Alabama (1999) |

